Skjal 5

JAVNSTØÐUNEVNDIN

**Birna Bærentsen, skrivari**
Fíggjarmálaráðið
birna@fmr.fo

11.01.2011

**Hoyringssvar - uppskot til løgtingslóg um manntal í 2011**

Javnstøðunevndin vil enn einaferð vísa á, at heitið Manntal er útihýsandi, ótíðarhóskandi og konservativt.

Hetta gjørdi Javnstøðunevndin longu vart við á fundi við verkætlanarleiðsluna, ið varð hildin 9. juni 2009, og í skrivi frá Javnstøðunevndini og Kvinnufelagasamskipan Føroya, dagfest 15. juni 2009. Sostatt eru limirnir í stýrisbólkinum og verkætlanarbólkinum væl og virðiliga kunnaðir um tað óhepna í at velja eitt so maskulint og útihýsandi navn sum Manntal.

Millum próvgrundirnar fyri, at heitið Manntal er tað einasta sum riggar, hava verið, at hetta altíð hevur verið brúkt (t-postur, dagfestur 15. juni 2009). Tað er harmiligt, at tað framvegis í 2011 í so stóran mun verður leitað aftur í fortíðina fyri at finna orð at seta á nútíðina og á framtíðina.

Siðvenjan í føroyskari málnýtslu hevur verið og er framvegis í alt ov stóran mun at brúka eitt mál, har normurin óneyðuga nógv er í kallkyni. Tað nýtist ikki at vera soleiðis, men veldst um viljan og evnini til at orða seg á nútíðarhóskandi máli. Týdningarmikið er, at tað almenna gongur á odda, tá ið tað ræður um at finna orðingar, sum fevna um bæði kynini.

Ein onnur próvgrund fyri, at heitið Manntal er tað einasta rætta er, at tað fevnir breiðari enn fólkateljing (t-postur, dagfestur 15. juni 2009). Hendan áskoðanin missir ikki sørt av trúvirðinum, tá ið hugt verður í viðmerkingarnar til lógaruppskotið, har orðini manntal og fólkateljing verða brúkt hvørt um annað. Manntal er sostatt ikki einasti møguleikin, og hetta orð er ikki meira rótfest enn orðið fólkateljing.

Tískil mælir Javnstøðunevndin enn einaferð til at broyta heitið, soleiðis at vandi ikki verður fyri at útihýsa tí eina kyninum frá hesi fyri okkara samfelag so týdningarmiklu verkætlan.

Heilsan

Javnstøðunevndin

Kristianna Winther Poulsen, forkvinna

Javnstøðunevndin • Box 366 • 110 Tórshavn • Tlf. 212848 • javnstoda@javnstoda.fo • www.javnstoda.fo